# Fremsta farmaflogfelagið fríggjar til føroyingar

**Danska flogfelagið Danish Air Transport hevur søkt Vinnumálaráðið um loyvi at flúgva millum Danmark og Føroyar. DAT er fremsta farmaflogfelagið í Danmark, sigur stjórin í felagnum**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Danska flogfelagið Danish Air Transport, DAT, hevur fyrr flogið til Føroya. Tað var í samband við oljuleitingina undir Føroyum. Men tá við minni flogfari, enn ætlanin nú er at nýta*
*Mynd: Edvard Joensen*

Stendur tað til leiðsluna í danska flogfelagnum Danish Air Transport, DAT, verður Atlantsflog ikki leingi einsamalt á rutuni millum Danmark og Føroyar. DAT hevur søkt Vinnumálaráðið um loyvi at flúgva á leiðini.

Jesper Rungholm, stjóri í DAT, váttar fyri Sosialinum, at felagið hevur eina umsókn um loyvi at flúgva liggjandi hjá Vinnumálaráðnum, og at bíðað verður eftir svari frá landsstýrismanninum.

Ætlanin er í fyrsta umfari at flúgva við ferðafólki um jóltíðir, sigur Jesper Rungholm. Síðan er flogfarið, ætlanin er at brúka, leigað út til fram móti páskum. Tá er so ætlanin at fara aftur at flúgva til Føroya, sigur hann.

Flogfarið, sum DAT ætlar at brúka á Føroyaleiðini, er av slagnum ATR 72 og tekur 66 ferðafólk, greiðir stjórin í felagnum frá.

Felagið hevur fyrr flogið til Føroya. Tað var í samband við oljuleitingina undir Føroyum, tá felagið hevði sáttmála við eitt av leitifeløgunum um at flýta arbeiðsfólk millum Aberdeen og Vágar. Tá varð flogið við einum minni flogfari, ATR 42, sum tekur 46 ferðafólk, sigur Jesper Rungholm.

Hann sigur, at tey hava eisini hugsað um farmaflúgving, nú tey hava lagt umsókn til Vinnumálaráðið.

– Eg kann siga, at vit eru fremsta danska flogfelagið, tá tosað verður um farmaflúgving, sigur hann. Vit hava góðar royndir á tí økinum. Eisini við posti.

Talan er um rímiliga nýtt propelflogfar, sum ætlanin er at flúgva til Føroya við, sigur Jesper Rungholm. Tað fer at taka longri tíð, enn tað tekur við jetflogførum. Men tað metir hann ikki hava ta stóru ávirkanina á hugin hjá ferðafólki at nýta teirra felag.

– Vit hava royndir við at flúgva langt við hesum flogførunum. Eitt nú flugu vit nógv til Dubrovnik seinasta summar. Tað var ein túrur, sum tók umleið fýra tímar. Men fólk fingu góða tænastu umborð, og tað hildu tey viga væl upp í móti tíðini, tey sótu í flogfarinum, sigur hann.

Hann sigur, at tey hava mett tíðina, ferðin til Føroya tekur, til góðar tríggjar tímar. Ella umleið ein tíma longri, enn eitt nú Atlantsflog brúkar.

Jesper Rungholm sigur seg hava frætt, at nevndarformaðurin í Atlantsflog skal hava sagt, at hann ikki heldur tað vera rætt, at eitt felag, sum ætlar at kappast við Atlantsflog, bert skal flúgva partar av árinum. Tað átti heldur at verið so, at flogið var alt árið, so felagið soleiðis tók sín part av sleipinum, sum hann tók til.

Til hetta sigur Jesper Runghom, at ætlan teirra júst er at flúgva regluliga. At steðgur verður millum jól og páskir, kemst bert av, at tá er ATR72 flogfarið, sum nýtast skal á Føroyarutuni, leigað út. Men á páskum er tað aftur tókt og fer tá at flúgva regluliga til Føroya, um loyvi fæst til tess, sigur hann.

# Vinnumálaráðið viðmælir

**Vinnumálaráðið viðgjørdi á fundi týsmorgunin umsóknina frá Danish Air Transport um at sleppa at flúgva til Føroya. Vinnumálaráðið hevur onga viðmerking, sum er tað sama sum viðmæli, og letur nú umsóknina til danska ferðslumálaráðið at játta ella nokta**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Gongur danska ferðslumálaráðið umsóknini hjá DAT á møti, fær Atlantsflog væntandi kapping um ferðafólkini longu til jólar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Umsóknin frá danska flogfelagnum Danish Air Transport hevur verið til viðgerðar í Vinnumálaráðnum. Hon er send danska ferðslumálaráðnum uttan viðmekringar. Tað merkir í stuttum, at Vinnumálaráðið viðmælir, at felagið sleppur at flúgva á Føroyarutuni, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður.

Hann sigur, at Vinnumálaráðið á fundi týsmorgunin viðgjørdi umsóknina og hevði einki at viðmerkja til ta frágreiðing, felagið hevur lagt við umsóknini. Men Vinnumálaráðið kann bert gera tilmæli. Avgerðin um loyvi liggur hjá danska feðrslumálaráðnum, og hagar er umsóknin nú send saman við viðmæli frá Vinnumálaráðnum.

Bjarni Djurholm sigur, at hann væntar, at Ferðslumálaráðið fer at ganga umsóknini á møti,og at DAT helst fer at flúgva longu fyri jól.

Hann sigur, at hann hevur skilt umsóknina soleiðis, sum at felagið fer at hava ein steðg til páskar, tá flogfarið aftur verður tókt, og so verður flogið áhaldandi. Umsóknin og tann frágreiðing, sum við lá, snúði seg um flúgving í eitt ár, sigur hann.



# Hongur snøgt sagt ikki saman

**Tingmaðurin hjá Sambandsflokkinum, Jóhan Dahl, undrast stórliga á, hvussu eitt nú FAS-skipanin hjá farmaflotanum, minstalønin hjá sjómonnum og neytastuðul sleppa gjøgnum nálareyga hjá umsitingini, meðan stuðul til rækjuvinnuna verður mettur at stríða við altjóða lóg**

RÆKJUVINNAN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Vit vassa í líknandi stuðulsskipanum, sum ætlanin er at veita rækjuvinnuni, og tí er tað løgið, at rækjuvinnan verður revsað sum einasta vinna, heldur Jóhan Dahl.*
*Mynd: savnsmynd*

Í Degi og viku mánakvøldið kom undan kavi, at ætlanin hjá landsstýrinum at veita rækjuvinnuni stuðul við afturbering av skatti er fyribils sett á síðulinjuna.

Uppskotið hjá landsstýrinum um skattaafturbering til rækjuflotan er beinleiðis í stríð við reglugerðirnar hjá altjóða handilsfelagskapurin, World Trade Organisation ella WTO, sum hevur greiðar ásetingar um, at tað er ikki loyvt at geva ávísum vinnum framíhjárætt.

Tá greiðar ásetingar eru í Stýrisskipanarlógini og Heimastýrislógini um, at føroysk lóggáva ikki skal stríða við altjóða lóggávu, hevur uttanlandsdeildin á Løgmansskrivstovuni boðað landsstýrinum frá, at uppskotið um stuðul til rækjuvinnuna ikki kann setast í verk í verandi líki.

### Undarlig støða

Sambandsflokkurin hevur gingið á odda fyri at veita føroyska rækjuflotanum stuðul, og flokkurin eigur hugskotið um eina afturbering av skatti til rækjuvinnuna. Fyrrverandi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum og tinglimur Sambandsfloksins, Jóhan Dahl, situr fullkomiliga spyrjandi, eftir at hann hevur hoyrt niðurstøðuna hjá uttanlandsdeildini á Løgmansskrivstovuni.

– Hetta er ein ótrúliga undarlig støða. Vit hava í dag eina rúgvu av stuðulskipanum, sum geva ávísum vinnum ein framíhjárætt. Her hugsi eg um FAS skipanina hjá farmaflotanum, minstuløn hjá sjómonnum, fóður- og neytastuðul, flutningsstuðul til feskfiskaflotan. Vit vassa í líknandi stuðulsskipanum, sum ætlanin er at veita rækjuvinnuni, og tí er tað løgið, at rækjuvinnan verður revsað sum einasta vinna, heldur Jóhan Dahl.

Fyrrverandi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum vísir á, at tað er rættiliga margháttligt, at eingin í umsitingini hevur talað at, fyrr enn nú, tí uppskotið um stuðul til rækjuflotan er eldri enn eitt ára gamal, men kortini hevur hvørki orð ella ei verið at hoyrt um, at uppskotið er eitt brot á altjóða lóg.

– Tá vit vóru í andstøðu løgdu vit sama uppskot fram í løgtinginum, og tá varð uppskotið góðtikið á Løgtingsskrivstovuni, men nú er støðan brádliga ein onnur, sigur Jóhan Dahl

### Kvotur í Barentshavinum

Tingmaður Sambandsfloksins slær fast, at Sambandsflokkurin ætlar ikki at sita hendur í favn, eftir niðurstøðuna hjá uttanlandsdeildini. Jóhan Dahl sigur, at Sambandsflokkurin fer at leggja nógv fyri at halda lyftið, sum rækjuvinnan hevur fingið frá landsstýrinum um eina hjálpandi hond komandi tvey árini.

– Vit fara at krevja av samgonguni, at hon finnur eina loysn. Eg dugi ikki í løtuni at siga ítøkiliga, hvat fyri loysn talan verður um, men tað verður ein loysn í málinum, sigur hann.

Jóhan Dahl vísir á møguleikan hjá rækjuvinnuni at fáa ein part av býtiskvotunum hjá fjarðfiskiflotanum í Barentshavinum.

– Ein partur av fjarfiskiflotanum í Barentshavinum fær síni veiðirættindi við hjálp av býtiskvotum, sum hava eitt virði á 500.000 krónur um árið. Rækjuvinnan hevur sjálv vunnið sær síni rættindi, men hon sleppur kortini ikki upp í part í Barentshavinum. Sjálvandi skal rækjuvinnan fáa ein part av býtiskvotunum í Barentshavinum, so hon við fleiri kvotum fær møguleika at klára seg komandi árini, heldur fyrrverandi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum.

### Endurskoða skipanina

Jóhan Dahl metir eisini tað er av stórum týdningi, at vit fara at kanna allar stuðulsskipanirnar, tí tað ber snøgt sagt ikki til, at ávísar stuðulsskipanir verða mettar at verða ólógligar, meðan aðrar sleppa gjøgnum nálareyga.

– Eg meti hatta vera ein stóran trupulleika, og ein trupulleika sum skal loysast. Vit mugu alt fyri eitt kanna um verandi stuðulsskipanir eru í tráð við altjóða lóg ella ikki, heldur hann.

> ”
> *Grein 55 í Stýriskipanarlógini.*
> *Løgtingslóg, ella partur av løgtingslóg, hevur ikki gildi, um*
> *a)hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, heimastýrið hevur gjørt við onnur lond,*
> *b)hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, Danmørk hevur gjørt við onnur lond, og sum eisini fevnir um Føroyar*

## Eingin vápn til Somalia

Gongst, sum Løgtingið ætlar, verður bannað føroyingum eitt nú at selja afrikanska landinum, Somalia, vápn.

Í løtuni liggur eitt lógaruppskot í Tinginum, sum leggur upp til handilslig revsitiltøk móti Somalia. Ætlandi verður uppskotið endaliga samtykt mikudagin. Fyrsta grein í uppskotinum sigur m.a., at tað er bannað at selja ella at royna at selja, avhenda, flyta ella á annan hátt at veita Somaliu vápn og hernaðarútbúnað umframt ein og hvønn líknandi útbúnað. Eisini er bannað at selja lóður, hernaðarakfør og hernaðarútgerð, hálvhernaðarliga útgerð og eykalutir til nevndu hesar lutir. Tað er danska uttanríkisráðið, sum umvegis ríkisumboðsmannin í Føroyum hevur heitt á Løgmansskrivstovuna um at skipa so fyri, at Føroyar fremja ávís handilstiltøk ímóti Somaliu, samsvarandi eini samtykt hjá Trygdarráði Sameindu Tjóða, skrivar heimasíðan hjá Sparikassanum. Orsøkin til revsutiltøkini er drúgva vápnaða stríðið í afrikanska landinum.

## Langt til líkaløn

Heimasíðan hjá Vinnuhúsinum veit at siga, at lønirnar hjá kvinnum og monnum í Portugal, Belgia, Italia og Australia liggja tættari at hvørjum øðrum enn í Norðanlondum. Danmark er tó frammanfyri Frankaríki, Grikkaland, Spanien og Ný Sæland, meðan Svøríki og Finnland koma væl longri niðri á yvirlitinum.

Sambært sosiologiinum, Catherine Hakim, skyldast ein partur av muninum – og tann lutfalsliga vánaliga støðan hjá norðanlondum – tann "kvinnuvinarliga" familjupolitikkin. Við at gera skipanir, har kvinnur fáa barsilsfarloyvið, umsorganardagar og taka farloyvi, verða tær afturúrsigldar í lønakappingini á arbeiðsmarknaðinum. Hetta er høvuðsorsøkin til tann stóra munin. "Fyri at fáa succes skalt tú fokusera upp á sítt arbeiði, og færri kvinnir enn menn gera tað. Tí kappast fleiri menn um tey bestu størvini", sigur Catherine Hakim.

# Jokarin heldur seg til fakta

**Tingmaðurin hjá Javnaðarflokkinum, John Johannessen, fæst ikki at siga, at hann er fegin um, at ætlanin at veita rækjuvinnuni stuðul er fyribils slept. – Eg haldi meg bara til fakta í málinum, sum er, at tað er brot á WTO-reglur at vit veita stuðul, sigur javnaðartingmaðurin**

RÆKJUVINNAN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Løgtingslimurin hjá Javnaðarflokkinum, John Johannessen, hevur fleiri ferðir givið til kennar, at hann metir ikki tað rætt av tí almenna at veita kreppuraktu rækjuvinnuni stuðul. Ungi tingmaðurin er sannførdur um, at vinnan eigur at klára seg sjálv uttan almennan stuðul. Javnaðarflokkurin hevur gingið í fleiri bólkum, tá spurningurin um stuðul til rækjuvinnuna hevur verið umrøddur í flokkinum.

Spurdur um niðurstøðan hjá uttanlandsdeildini, at rækjustuðulin stríðir við altjóða lóg, kemur væl við persónliga, svarar John Johannessen, at tað ger tað ikki beinleiðis.

– Eg haldi tað er skeivt at veita stuðul til vinnulívið, tí tá fer tráanin hjá vinnuni at klára seg sjálva burtur. Tú kanst ikki beinleiðis siga, at eg fegnist um niðurstøðuna, tí tað er ikki vist, at stuðul ikki kann veitast á annan hátt. Eg haldi meg bara til fakta í málinum, sum er, at tað er brot á WTO-reglur vit veita stuðul til rækjuvinnuna, sigur javnaðartingmaðurin John Johannessen.

Spurdur, hvørja ætlan Javnaðarflokkurin hevur fyri at hjálpa rækjuvinnuni, svarar tingmaðurin, at málið er ikki enn viðgjørt innanhýsis í flokkinum, og tí ber ikki til at siga, hvørja støðu flokkurin hevur í málinum.

### Keypa kvotur

Ætlanin hjá landsstýrinum var at veita rækjuvinnuni í alt 20 mió krónur í stuðli komandi tvey árini, men henda ætlan er fyribils slept. John Johannessen heldur, at ein skilagóð loysn kundi verið at givið rækjuvinnuni ein part av býtiskvotunum í Barentshavinum.

– Vit eiga at býta ressoursurnar betur. Á hvørjum ári gera vit eitt stórt býti í kvotum Barentshavinum, tó uttan at rækjuvinnan fær nakran part. Møguliga áttu vit at lagt okkum eftir at givið nakað hesum býtinum til rækjuflotan. Eg haldi tað nógv skilabetri at hjálpa rækjuvinnuni við at geva henni fleiri kvotur enn at geva vinnuni beinleiðis rakstrarstuðul, heldur hann.